Úrslit av góðum tíðum:

# Tey ungu tíma ikki á studentaskúla



*Góðu tíðirnar hava við sær, at tey ungu heldur velja at arbeiða enn at fara á eitt nú studentaskúla. Men talið á næmingum á studentaskúlanum á Kambsdali er í ár vaksið fyri fyrstu ferð í fleiri ár*

*Savnsmynd*

**– Næmingatalið er fallið tey seinastu árini, men í ár er tað vaksið við einum hálvum flokki, sigur Sámal í Skorini, rektari á Studentaskúlanum á Kambsdali. Grundina metir hann vera tær góður tíðirnar**

SKÚLI
*Ingrid Bjarnastein*

Um slakar tvær vikur verður aftur hol sett á eitt nýtt skúlaár. Tá lata dyrnar á teimum ymsu miðnámsskúlunum hurðarnar upp fyri bæði spildurnýggjum og gomlum næmingum.

Á Studentaskúlanum á Kambsdali hevur gingið aftur á bakka, hvat næmingatalið viðvíkur seinastu árini. Men í ár er hetta talið vaksið fyri fyrstu ferð.

– Í ár byrja vit við einum fullum matematiskum flokki, einum fullum málsligum flokki og einum flokki, sum er hálvur málsligur og hálvur matematiskur, sigur Sámal í Skorini, rektari á Studentaskúlanum á Kambsdali.

– Ein hálvur matematiskur og málsligur flokkur vil siga, at næmingarnir hava felagslærugreinarnar saman, meðan serlærugreinarnar, sum matematik, fysik, kemi, biologi og annað, verður undirvíst í hvør sær.

Hetta er fyrstu ferð roynt verður at hava ein hálvan flokk av matematikarum og málslingum á henda hátt, so í veruleikanum, so byrjar hálvur fjórði flokkurin á Kambsdali eftir summarfrítíðina.

## Góðar tíðir

Rektarin á Kambsdali metir, at tær góðu tíðirnar hava við sær, at tey ungu ikki tíma í skúla. Eftir 10 ár í fólkaskúlanum velja tey heldur at fáa sær arbeiði, har tey kunnu forvinna pening.

– Ein ung genta kann fara við eitt nú Næraberg og forvinna upp í 25-30.000 krónur, og tað kann vera meira dragandi enn aftur at seta seg á skúlabonk. Eisini vísir tað seg, at teir ungu dreingirnir fara í læru ístaðin fyri at koma í skúla, sigur Sámal í Skorini.

Men hetta er eitt afturvendandi mynstur, heldur rektarin. Tá tíðirnar eru góðar, er tómligt í skúlanum, og tá tíðirnar eru verri, er fult á skúlanum.

Sámal í Skorini sigur, at talið á næmingum er ikki fallið orsakað av skúlanum í Hoydølum. Tað kundi annars verið, at valt varð heldur at fara í skúla í høvuðsstaðnum enn úti á bygd.

– Reglurnar eru greiðar fyri hesum. Um tú býrt til dømis á Eiði, og søkir inn í Hoydølum, so sleppur tú rætt og slætt ikki inn, so hetta er ikki grundin til, at næmingatalið hevur verið fallandið.

– Handilsskúlin gevur heilt vist eisini harða kapping, og tú hevur kanska lagt til merkis, at vit leggja meira orku í at lýsa við skúlanum um várið áðrenn søkjast skal, greiðir Sámal í Skorini frá.

Men hann vísir á, at høvuðsstaðurin er ofta nógv meira dragandi enn eitt næstan at kalla oyðimarkarøki sum Kambsdalur.

– Tað vísir seg ofta, at har nógv fólk eru frammanundan, har flyta meira fólk til. Fólk leita eftir fólki. Uppgávan hjá okkum er so at royna at skapa nakað, sum er áhugavert. At skapa eitt skúlaumhvørvið, sum er áhugavert fyri næmingarnar, og tað kann vera eitt sindur trupult á einum so óbygdum øki sum Kambsdalur. Tá tú gongur í skúla í Havn, so ert tú næstan mitt í býnum.

Men sjálvur heldur Sámal, at tað hevði ikki hjálpt at flutt skúlan til eitt meira bygt økið. Hann vísir á, at tað hevði nyttað lítið, at flutt skúlan til Leirvíkar ella Syðrugøtu. Tað hevði skulað verið eitt av størru plássunum, sum eitt nú Runavík.

## Fast samband skapar møguleikar

Sámal í Skorini metir, at fasta sambandi um Leirvíksfjørð er sera spennandi, hvat skúlanum viðvíkur.

– Tann dagin vit fáa fast samband við Klaksvíkina er spennandi at síggja, hvat so hendir. Hetta kann hava við sær, at næmingatalið veksur, men tað kann eisini vera, at næmingatalið minkar, tí í Klaksvík er jú tekniskur skúli og HF. Henda spurningin ber ikki so væl til at svara uppá enn, men tað kemur tíðin at vísa, hvat hetta fer at hava við sær á skúlaøkinum.

– Eg giti eisini, at eysturoyingar fara ikki at vera so skjótir at fara á Landssjúkrahúsið, men minst líka nógvir fara at leita sær til Klaksvíkar, sigur hann í stuttari síðuviðmerking.

Men fasta sambandið fer heilt vist at hava fyrimunir fyri klaksvíkingar, ið leita sær á Studentaskúla á Kambsdali. Seinastu árini hevur ferðasambandið verið keðiligt, og ofta hava næmingar verið noyddir at bíða í meira enn ein tíma á skúlanum áðrenn teir sleppa við bussi til Leirvíkar og síðani yvirum til Klaksvíkar.

## Lærarar velja Havnina

Tað vísir seg, at stórur áhugi er fyri studentalærarastørvum í Havnini. Eini 70 umsóknir vóru til trý lærarastørv. Men á Kambsdali er áhugin verri enn so eins stórur.

– Vit hava nøkunlunda sama tal á størvum her á Kambsdali sum í Havn, og tá tey í Havn hava 70 umsøkjarar, hava vit bara 15, sigur Sámal í Skorini, og vísir aftur á tað, at Havnin er meira dragandi enn eitt útjaðaraøkið.

Harafturat lýsti Studentaskúlin á Kambsdali fýra størv leys, meðan tann í Hoydølum bert hevði trý. Men framvegis vóru nógv færri umsóknir til størvini á Kambsdali.

Men hóast lærarar ikki tíma so væl til Kambsdal, so verður farið undir nýggja skúlaárið við góðum treystið, og ikki nóg mikið við tí: Í heyst fyllir Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoynni 20 ár. Enn veit rektarin ikki, hvat ella um nakað verður gjørt burturúr, men tað kemur tíðin at vísa.



# Upp á gólv í Øravík



*Farið verður upp á gólv í Øravík. Dansifeløg í Suðuroynni og Gistingarhúsið við Á í Øravík skipa fyri dansinátt tann 17. august. Tiltakið hesaferð er partur av Listastevnuni*

**Fyri triðju ferð verður skipað fyri dansinátt í Gistingarhúsinum við Á í Øravík og ætlandi er hetta tiltak komið fyri at verða. Tað eru dansifeløg og gistingarhúsið, ið skipað fyri**

DANSUR
*Dagfinn Olsen*

Fyri triðju ferð verður skipað fyri dansinátt í Øravík. Dansináttin verður tann 17/8 og tað eru dansifeløgini í Suðuroynni, ið skipa fyri, saman við Gistingarhúsinum við Á.

Dansináttin hesaferð er partur av Listastevnuni. Tiltakið hevur verið fyrr og er ætlað sum árligt og afturvendandi tiltak. Tiltakið hevur ligið fast annað vikuskifti í august, men orsakað av bátastevnuni á Tvøroyri, er tiltakið í ár flutt til tann 17. august.

Tiltakið í ár er skipað á sama hátt, sum undanfarin ár. Byrjað verður klokkan 20 við borðhaldi við heitum rættum og felagssangi. Tá dansifólk koma saman er altíð onkur, ið fegin sigur frá onkrari dansiferð og vanliga er eisini onkur skemtisøga at hoyra. Umleið klokkan 23 verður farið upp á gólv.

Fyrireikararnir vóna, at løtan verður eins hugnalig, sum í fjør, tá eini 150 fólk luttóku. Nærri verður lýst um dansináttina í bløðunum, siga fyrireikararnir. Dansifeløgini, ið skipa fyri, eru Suðuroyar Norðara Dansifelag, Tvøroyrar Dansifelag, Jómsvíkingar Dansifelag og Sumbiar Dansifelag.

# Forvitnislig tónleikatiltøk hesa vikuna



*The Real Group*

**Fleiri forvitnislig tónleikatiltøk eru á Listastevnuni, tað ið eftir er av vikuni**

LISTASTEVNAN
*Dagfinn Olsen*

Listastevnan hevur mong tónleikatiltøk av alskins slag at bjóða. Tað, ið eftir er av vikuni, eru fleiri áhugaverd tiltøk.

Í kvøld hevur Jóannes Andreasen konsert í Fuglafirði. Fríggjadagin er guitarkonsert við føroyskum guitarleikarum í Runavík.

## Egmonti

Egberto Gismonti er stórt navn. Hann fer á pall í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið. Manningin er komin til Føroya í dag og longu í kvøld byrja teir at venja. Edvard Nyholm Debess er partur av manningini, sum fer á pall saman við úrmælinginum úr Brasilia.

Sunnudagin er kingosangur á skránni. Petra Iversen og Eivør Pálsdóttir framføra í Kaldbk. Og mánadagin fara Enekk á pallin í Norðurlandahúsinum. Nógv hevur ikki verið at hoyrt til manningina í Enekk í longri tíð, so gleðiligt er, at Enekk aftur er saman sum bólkur og framførur sín sermerkta, og føroyskt grundfesta tónleik á palli

Komandi vika hevur eisini fleiri áhugaverd tónleikatiltøk at bjóða, og nevnast kann heimskendi bólkurin The Real Group.

Føroyski Barnafilmurin

# Tað er nokkso víst

**Føroyski barnafilmurin, sum klaksvíkingar arbeiða við, saman við stórum donskum filmsframleiðarum, tykist veruliga hava fingið vind í seglini ta fyrstu truplu leiðina. Fyribilssáttmáli er á veg við postinum**

FILMUR
*Dagfinn Olsen*

Eitt ævintýr segði eina ferð, at »det er ganske vist...«, men tá var tó einki endaliga avgjørt. Eitt føroyskt filmsævintýr er tó um síggja dagsins ljós, um enn allar súðir ikki eru syftar enn.

Í blaðnum í gjár nevndu vit føroyska barnafilmsætlan, sum tveir kendir danskir filmsframleiðarar hava verið í Føroyum og kannað, fyri at vita, um teir hava áhuga í ætlanini.

Áhugan hava teir. Og nú hava føroysku fyrireikararnir fingið váttan fyri, at ein fyribilssáttmáli er á veg við postinum, so teir fáa arbeiðsfrið at arbeiða víðari.

Frá fyrireikarunum frætta vit, at nú eru nøkur ávís stig at taka í arbeiðsgongdini. Tað er at fáa arbeiðið góðtikið hjá donsku filmsframleiðarunum. At fáa skriva endaliga handritið og at fáa avgreitt sambondini við stovnar og aðarar fíggjarveitarar.

Og tá tungu dreingirnir innan danskan film siga seg stuðla, so eru nógvar hurðar opnar.

Filmurin snýr seg um drong, ið hevur samband við tað yvirnáttúrliga, við álvaheim. Og nógvur føroyskur uppruna-tónleikur verður ætlandi partur av ætlanini.

Hvørt komið verður á mál í arbeiðsgongdini, er enn ikki víst, men víst er tó, at fyrstu truplu fetini eru tikin og eru væleydnað.



*Fólkini aftanfyri Trølla Pætur arbeiða við spennandi filmsætlanum*